Framburðurin í føroysku alivinnuni seinastu 30 árini

Bygdamenningarpolitikkurin verið avgerandi

Gestur Hovgaard er ikki í iva um, hvør orsøkin til, at føroyingar hava havt so framburðsríka alivinnu í Føroyum. Umstríddi bygdarmenningarpolitikkurin hevur eftur hansara tykki verið avgerandi. - Av tí, at føroyingar høvdu vegir, havnir, telefon og streym til nærum hvønn krók í landinum merkti jú, at alivinnan hevði grundfyritreytirnar at koma í gongd, sigur Gestur Hovgaard, ið er við kanadiskari verkætlan um alivinnu

ALIVINNAN
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

-Í dag er eitt ótal av smærru virkjum á altjóða pallinum, sum klára seg væl, og eg ivist stórliga í, um éin stór føroysk alifyritøkuna hevði staðið seg betur enn tær smærru. Eg haldi, at vit heldur skulu hugsa í netverkum, har tey smáu virkini arbeiða saman við teimum størru, sigur Gestur Hovgaard, ið dagliga starvast á Granskingardepilinum í Klaksvík.
Mynd: Jens Kristian Vang

Klaksvík: Alivinnan er seinastu 30 árini vaksin frá nærum ongum, til at vera ein týdningarmikil liður í føroyska búskapinum. Sama er galdandi fyri eitt nú lond sum Noregi, Kili, Kanada og Skotland. Men stórur munur er á, hvussu væleydnað vinnan er í teimum ymisku londunum.

– Eg haldi at vit, hóast núverandi kreppuna, liggja í fremstu rað saman við Noregi, sigur Gestur Hovgaard, sum seinastu árini hevur luttikið í eini størri kanadiskari verkætlan innan alivinnu.

Gongdin í alivinnuni hjá okkum og í Noregi hevur verið, at tað byrjaði við nógvum smáum fyritøkum. So kom tann fyrsta stóra kreppan, og hóast framvegis smá í altjóða høpi, gjørdust virkini størri og størri og flættaði seg inn í eina "globala" vinnu. Nú tað aftur er stígur í er avgerandi, at vit duga at gera okkum dælt av royndunum, vit hava fingið.

– Vanliga hoyra vit, at lønarlagið er avgerandi fyri, hvussu vit standa okkum í eini kapping, men her skulu nøkur fyrilit takast. Hvussu ber til, at hálønarlondini Føroyar og Noregi hava ein nógv meiri framkomna alivinnu enn eitt nú Skotland, Kili og Kanada við lægri lønum?, spyr Gestur.

Hann sigur, at kjarnan í vinnuligum framburði eru hugtøk sum nýskapan, siðvenja og ikki minst, hvør politikkur verður fordur á øðrum økjum, enn teimum reint vinnuligu.

Infrastrukturur gull verdur

Fyri at finna orsøkina til, hví føroyingar hava havt eina so framburðsríka alivinnu, sigur Gestur, at vit mugu leita aftur til bygdarmenningarpolitikkin.

– Líkamikið hvønn hugburð, ein hevur til bygdamenningarpolitikkin, so skerst ikki burtur, at hetta var við til at geva okkum ein ótrúliga góðan infrastruktur.

Av tí, at føroyingar høvdu vegir, havnir, telefon og streym til nærum hvønn krók í landinum merkti jú, at alivinnan hevði grundfyritreytirnar at koma í gongd. Hetta er als ikki nakað sjálvsagt í Skotlandi, Kanada og serliga ikki í Kili, har har tað kemur fyri, at ein skal ganga fleiri kilometrar fyri at koma fram til alibrúk og ein støðug elveiting er heldur ikki nøkur sjálvfylgja.

Talan er sjálvandi um eina avleidda effekt, sum einki beinleiðis hevði við bygdamenningarpolitikkin at gera. Men tað sigur avgjørt nakað um týdningin av, at alt føroyska samfelagið hevur møguleikan at mennast. Ein veit aldrin, hvaðani næsta stóra vinnan kemur, og hvør infra-strukturur skal til.

Siðvenjan og kunnleiki frá fiskivinnuni hjálpt nógv

– Føroyingar hava gjøgnum tíðina ment eina sterka siðvenju fyri íverkseting, lokalum eigaraskapi og tað vit kunnu kalla "praktiskan kunnleika", nakað sum hevur verið eitt sterkt eyðkenni við føroysku fiskivinnuni. Hesar somu royndir avspeglast eisini í framburðinum í alivinnuni, sigur Gestur Hovgaard

Gestur heldur ikki tað vera av tilvild, at nógv av teimum sum byrjaðu alivinnuna, høvdu praktiskar royndir innan fiskivinnuna. Tá stórur partur av tí tøkni, sum nýtt verður í alivinnuni, sprettir úr fiskivinnuni, høvdu fólkini ein kunnleika frammanundan, sum gjørdi tey før fyri at fara í gongd. Bæði í Noregi og Føroyum eru eisini siðvenjur fyri at býta vitan ímillum sín, og ger hetta, at nógvir partar fáa ágóðan av somu vitanini.

– Bæði í Kili og Skotlandi síggja vit, at vinnan hevur havt stórar trupuleikar at tillaga seg nýggjastu tøknina, og hetta kann júst forklárast við, at hesi ikki høvdu nevndu siðvenjur, greiðir Gestur frá.

Nýggjar tíðir og nýggjar avbjóðingarnar

Í dag er alivinnan partur av einum altjóða vinnustrukturi, og hetta gevur nýggjar avbjóðingar fyri framtíðina, og serliga hevur spurningurin um útlendskan kapital í føroyskari vinnu verið nógv umrøddur. Gestur leggur her dent á, at tað er neyðugt við nógvum kapitali í alivinnuni, men stóra knútapunktið er, um samanlegging av virkjum í sær sjálvum er nøkur loysn.

– Í dag er eitt ótal av smærru virkjum á altjóða pallinum, sum klára seg væl, og eg ivist stórliga í, um ein stór føroysk alifyritøkuna hevði staðið seg betur enn tær smærru. Eg haldi, at vit heldur skulu hugsa í netverkum, har tey smáu virkini arbeiða saman við teimum størru, sigur hann.

Sokallaða globaliseringin er ikki nakað sum kemur uttaneftir og inn yvir okkum, men nakað sum er inni í okkum sjálvum. Vit eru líka nógv partur av "tí globala" sum onnur eru tað. So hví hugsa vit ikki um at keypa vinnulív aðrastaðni, eins væl og onnur keypa seg inn her?, vísir Gestur á spyrjandi

Hann leggur afturat, at viðvíkjandi alivinnuni í framtíðini eru nógvir aðrir spurningar at fyrihalda seg til enn útlendskan kapitalur.

Hann heldur, vit eiga at hugsa nógv meiri í marknaðum. Tað er sera sterka keyparasíðan, ið setir standardin fyri góðsku, nøgd og prísi. Spurningurin er tí, hvussu vit finna nýggjar marknaðir, nýggja tøkni og nýggj sløg av samstarvi millum fyritøkur og lond á framleiðarasíðuni, soleiðis at støðan hjá føroysku alivinnuni gerst betri.

Í øðrum lagi er spurningurin, hvussu føroyingar megna at lúka altjóða politisk krøv, ikki minst tey frá ES. ES hevur seinastu 10-15 árini broytt matvørupolitikk frá at leggja áherðslu á matvørutrygd til nú á matvørutryggleika. Hetta merkir, at ES ikki longur lengur dent á stór yvirskotsgoymslur av smøri og oksakjøti, men heldur leggur seg eftir at forða neytaði og munn-kleyvasjúku" v.m. Vit hava higartil megnað væl at fylgja broytingunum hjá ES, men framyvir verða enn størri krøv til okkara egna førleika, bæði fyri virkini, men eisini almenna uppgávan ísv. veterienar viðurskifti (ILA v.m).

Í triðja lagi er tað so, at alt størri og størri dentur verður lagdur á formliga ella teoretiska vitan. Tað er hendan vitanin, sum stýrir EU-poltikkinum og altjóða fyritøkum, og hon er eisini alneyðug.

– Vit mugu ikki gloyma týdningin av tí praktiska kunnleikanum, ið sum ávíst var ein fyritreyt fyri, at føroyska alivinnan kundi mennast. Hvussu vit megna neyðuga samanpælið millum teoretiska og praktiska kunnleikan er heilt avgerandi. Fyrsta fyritreytin er, at vit ikki missa ta drívmegina, vit hava við siðvenju fyri íverkseting, smáfyritøkum við lokalum eigaraskara og einum spjaddum búsetingarmynstri, sigur Gestur Hovgaard at enda.

Alarar óttast nýggjar byrðar

Nógv bendir á, at alivinnan fer at fáa nýggj krøv frá politisku myndugleikunum, ið leggja upp til stórar íløgur. Samstundis sum stórar mongdir av laksi skulu slaktast í næstum, er ein nýggj kunngerð á veg, sum krevur ógvusligar íløgur í brunnbátarnar, ið flyta laksin til kryvjivirkini. Alivinnan megnar illa íløguna í løtuni

ALIVINNA
Ingi Rasmussen
ingi@sosialurin.fo

Brunnbátar skulu vera tryggari, sigur nýggj kunngerð, og tað kann merkja íløgur fyri milliónir til frammanundan illa sperdu alivinnuna
Tilvildarlig mynd

Onkrir glottar eru at hóma í alivinnuni. Sambært fólkum í vinnuni er marknaðarprísurin hækkaður spakuliga síðstu tíðina, so hann loksins liggur oman fyri framleiðslukostnaðin.

Men júst sum tað er farið at síggja eitt sindur ljósari út, óttast alarar fyri, at nýggj almenn krøv aftur fara at gera tað torførari hjá teimum at fáa tað at bera til. Alarar hava nevniliga fingið boð frá Vinnumálaráðnum um, at ein nýggj kunngerð er ávegis, sum herðir krøvini til brunnbátarnar so nógv, at tað kanska ikki fer at bera til at sigla frá smoltstøðum til alibrúk og frá alibrúkum til slaktistøðini við verandi útgerð.

Ein alari greiðir frá, at kunngerðin fer at krevja íløgur í brunnbátar fyri stórar upphæddir, tí sum er, klára alibrúkini ikki at liva upp til kunngerðina.

Afturlætnir ventilar

Nýggja kunngerðin er ein liður í ætlanini at basa sjúkum í føroyskum alibrúkum. Sum er, kunnu brunnbátar í dag flyta fisk við opnum ventilum. Men kunngerðin leggur upp til, at tað bara skal siglast við afturlætnum ventilum. Tað merkir, at sama vatnið er í lastini alla tíðina.

Alarar, sum Sosialurin hava tosað við, siga kunngerðina vera í lagi, um talan er um sjúkan fisk. Men kravið er alt ov hart, um hon eisini skal fevna um flutning av frískum fiski.

– Her kann vera talan um íløgur fyri milliónaupphæddir, tí talan er um stórar nøgdir av fiski, sum skulu flytast í senn. Vónandi fer hetta ikki at raka okkum soleiðis, at vit koma í kløtur við allan tann fiskin, sum skal slaktast í heyst og í vár. Íløgan er trupul, tí tað er avmarkað, hvat alivinnan hevur at arbeiða við í løtuni, sigur ein alari í Eysturoynni.

Kunngerðin kemur illa við, um hon sum ætlað kemur í næstu viku, tí fólk meta, at alifiskur fyri einar 400 milliónir krónur svimur í ringunum, sum skal slaktast rættiliga skjótt.

Ikki komin enn

Tað er fiskadjóralæknin, Bjørn Harlov, sum er meistari fyri kunngerðini, men Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, hevur onga viðmerking til málið í løtuni, tí kunngerðin enn ikki er komin á hansara borð.

– Talan er um tvær kunngerðir, sum ikki eru lýstar enn. Onnur snýr seg um ILA og hin snýr seg um rakstarformar. Eg havi ikki sað kunngerðirnar enn, men eg vænti at fáa tær á mítt borð fyrsta dagin. Fyrr enn eg havi sað tær, fái eg ikki gjørt nakra viðmerking, sigur Bjarni Djurholm.

Tað ljóðar, at marknaðarprísurin á laksi er farin upp um 20 krónur í miðal. Selt er fyri 22 krónur kilo hesa vikuna. Framleiðslukostnaðurin er einar 19 krónur í miðal, og tað eru endiliga góð tíðindi fyri alivinnuna, at tað aftur er yvirskot í framleiðsluni av hvørjum kilo av laksi. Tí vóna alarar ikki, at útlitini verða spilt av nýggjum útreiðslum.

Talið á lærlingum lækkar

Landsstýrið átti ikki at lækkað endurgjaldið fyri læruplass, tí tað elvir til, at talið á lærlingum lækkar uppaftur meira, heldur vinnan

FÍGGJARLÓG 2004
Ingi Rasmussen
ingi@sosialurin.fo

Færri lærlingar fáa læruplass.

Tað verður avleiðingin av ætlanini hjá landsstýrinum at lækka endurgjaldið til læruplass, meðan lærlingur er í skúla, sigur Vinnuhúsið.

Í uppskotinum til figgjarlóg fyri 2004 stendur, at uppskot verður lagt fyri løgtingið í heyst, sum lækkar endurgjaldið til læruplássið úr 75 prosentum niður í 50 prosent. Hetta er aðru ferð innan fyri síðsta árið, at endurgjaldið skal broytast, tí 1. januar 2003 lækkaði endurgjaldið úr 100 niður í 75 prosent. Nú fer játtanin so aftur úr 14,6 milliónum krónum niður í níggju milliónir krónur.

Vinnan mælir landsstýrinum frá at lækka endurgjaldið einaferð afturat, tí tað økir vandan fyri, at færri lærlingar fáa læruplass. Vinnuhúsið sigur, at fyri tað einstaka virkið, sum eitt nú tekur ein lærling innan elektrikarayrkið, koma broytingarnar at merkja eina meirútreiðslu á umleið 50.000 krónur í lærutíðini. Talan er um upphæddir, sum merkjast, sigur Vinnuhúsið.

Higartil í ár eru 22 færri lærlingasáttmálar gjørdir enn árið frammanundan. Við búskapargongdini og ótryggu kørmunum er væntandi, at tilgongdin lækkar enn meira, og tí átti landsstýrið at latið endurgjaldið verið óbroytt, nú búskaparvøksturin er steðgaður, sigur Vinnuhúsið.